## Nokia selur mest

Nokika 6300 er nógv mest selda fartelefonin í november. Svenska fyritøkan, Krusell, sum selur fartelefonir til fleiri enn 50 ymisk lond, hevur gjørt ein top-10 lista, og her er Nokia 6300 á einum tryggum fremsta plássi. Næstu telefonirnar á listanum eru Sony Ericsson K810i, Sony Ericsson K850i, Nokia N95 og Apple iphone.




## Hægri prísur á toski

Norskir alarar siga, at miðalprísurin fyri aldan tosk er øktur nærum fimm krónur fyri kilo hetta seinasta árið. Higartil í ár eru útflutt góð 3.000 tons av aldum toski úr Noreg. Sama tíðarskeið í fjørð vóru góð 2.700 tons útflutt. Miðalprísurin í ár er 38,45 norskar kr/kg. Sama tíðarskeið í fjør var miðalprísurin á aldum toski 33,68 kr/ kg.Tað eru serliga ES londini, sum keypa alda toskin. Higartil í ár eru 2.980 tons av toskinum farin á ES marknaðin. Frankaríki er størsta móttakaralandi, og higartil í ár eru góð 900 tons farin hagar. Útflutningurin til Frankaríki hevur stabiliserað seg, men ein afturgongd er í útflutninginum til Spania og Hollands. Størri nøgdir eru farnar til Danmarkar, Stórabretland og Belgia, skrivar Vinnuhúsið.

# Byrjaði hjá Kjølbro við

*- Eg vænti ikki, at tað verður nógv hjá nýggja formanninum í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard, at koma eftir, nú samráðingar eru, sigur Jákup Sólstein, fyrrverandi formaður í Føroya Reiðarafelag*



**Jákup Sólstein, sum seinastu 16 árini hevur staðið á odda fyri Føroya Reiðarafelag, er nú farin frá sum formaður, og hann er eisini farin úr nevnd felagsins. – Eg var púra avkláraður, nú eg legði frá mær, sigur maðurin, sum fyri skjótt fimmti árum síðan byrjaði at selja bláseym í timburhandlinum hjá Kjølbro í Klaksvík**

PRÁT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

67 ára gamli Jákup Sólstein kom í nevnd Føroya Reiðarafelags í 1982, og í 1991 gjørdist hann formaður eftir Osmund Justinussen, sum tá hevði staðið á odda fyri felagnum í eini 8-10 ár.

- Eg boðaði longu á aðalfundinum í vár frá, at eg fór at leggja frá mær og taka meg úr nevndini. Á hesum fundi varð eisini samtykt at hava ein eykaaðalfund í oktober/ november, har eitt nú bygnarbroytingar í felagnum skuldu umrøðast og ætlandi samtykkjast. Á hesum fundi skuldi nýggj nevnd veljast, og tá fór eg at trekkja meg sum formann og nevndarlim.

Jákup Sólstein sigur, at hann var púrasta avkláraður, nú hann tók hesa avgerð, og í dag er hann leysur av felagnum.

- Alt tað formella er ikki komið upp á pláss enn, og tí siti eg framvegis í onkrum álitisstørvum fyri felagið, eitt nú í forskotsgrunninum og stýrinum fyri ALS.

Hvussu leingi, hann kemur at sita í hesum álitisstørvum, veit hann ikki í løtuni.

### Eingin orsøk

Fyrrverandi formaðurin sigur, at hansara avgerð um at leggja frá sær als einki hevur við bygnaðarbroytingarnar í felagnum at gera. Avgerðin hevur heldur einki við formansskiftið í Føroya Fiskimannafelag at gera, ei heldur uppsøgnina av sáttmálanum millum feløgini.

- Ein broyting er, at ymsu skipabólkarnir nú formelt peika á – ella innstilla - síni uppskot til nevndina í Føroya Reiðarafelag, men hetta er sum so ikki tann stóra broytingin. Vit hava altíð roynt at havt breiða umboðan í felagnum, og tað verður framvegis soleiðis, at nevndin endaliga verður vald á aðalfundi.

Áður hava nevndarlimirnir verið valdir eftir øki, men nú verða tað so høvuðsskipabólkarnir, sum skjóta síni umboð upp á aðalfundi.

Jákup Sólstein sigur, at í prinsippinum hevur hvørt skip sína atkvøðu, tá ið avgerðir skulu takast á aðalfundi, og tað hevur ongan týdning, hvussu stórt ella lítið skipið er.

- Soleiðis hevur tað verið alla mína tíð, og mær vitandi hevur tað bara verið soleiðis. Eg haldi ikki, vit hava merkt okkum, at nøkur ónøgd hevur verið við hesa skipan, leggur hann aftrat.

### Einki tvang

Tað er eingin regla um, hvørjir skipabólkar kunnu vera limir í Føroya Reiðarafelag, men tað mest vanliga er, at útróðrarbátar og trolbátar, sum royna á landleiðini, bara eru limir í egnum feløgum, sum ikki eru limir í Føroya Reiðarafelag.

- Limaskapur í Føroya Reiðarafelag er frívilligur – og ikki tvang, sum hann tekur til.

Flestu størri skip eru limir í felagnum, men onkur einstøk skip eru ikki limir.

Avgerðin hjá Jákupi Sólstein um at leggja frá sær hevur heldur einki við samráðingarnar, sum nú standa fyri framman, at gera.

Hann veit at siga, at kunnandi fundur hevur verið millum Føroya Reiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag, og seinasta fríggjadag var fyrsti samráðingarfundur millum partarnar um nýggjan sáttmála.

Tað er Føroya Fiskimannafelag, sum hevur sagt sáttmálan við Føroya Reiðarafelag upp.

### Eingin reaktión

- Eitt av málunum, sum vit hava roynt at fáa upp á pláss fyri samráðingarnar við Føroya Fiskimannafelag hesaferð, var uppskotið um, at feløgini skuldu samráðast um sáttmálarnar hjá hvørjum skipabólki sær. Fyritreytir, prosentbýti og frádráttarviðurskifti eru so ymiskt. Tað eru nakrir mánaðir síðan, vit sendu Føroya Fiskimannafelag bræv um hetta, men mær vitandi hava vit einki frætt aftur.

Jákup Sólstein sigur, at ein slík skipan longu er fingin í lag við Føroya Skipara-og Navigatørfelag.

- Førir ein træta í onkrum skipabólki við sær, at partarnir ikki kunnu semjast, er lítil meining í, at eitt nú trolararnir eystanfyri skulu koma heima at liggja, tí partarnir ikki kunnu semjast um viðurskifti hjá ísfiskatrolarunum ella línuskipunum. Hetta virkar eisini undarligt, um tað er øvut – um ósemja um langfaraskipini leggur ísfiskaflotan undir Føroyum, sigur hann.

### Ikki í lummanum

Tað hevur ofta verið kastað Óla Jacobsen, fyrrverandi formanni í Føroya Fiskimannafelag, fyri, at hann var í reiðaralumma, tí eingi verkføll vóru í fiskiflotanum tey mongu ár, hann umboðaði fiskimenn.

- Nei, Óli var so avgjørt ikki í lummanum hjá okkum. Hann var rímiliga harður og ikki altíð so mjúkur at strúka. Hann var væl fyrireikaður og arbeiddi altíð fyri fiskimannin og dekkaran. Hinvegin var hann realistiskur og royndi altíð at finna pragmatiskar loysnir. Tøl vóru ein av hansara sterku síðum, og hann hevði gott minni. Eg vil siga tað soleiðis, at feløgini hava